## DAGSINS MEINING

# Oyggjaleikirnir í Hetlandi

Frálíka tiltakið Oyggjaleikirnir, sum nú hevur nøkur ár á baki, tykist at hava fingið fast undir fótum og er vorðið eitt fast afturvendandi tiltak. At vit sum oyggjaland koma í samband við onnur oyggjasamfeløg og oyggjafólk við hesum ítróttarleikunum er bara at fegnast um. Oyggjaleikirnir hava okkara fulla stuðul og vónandi fara myndugleikarnir her á landi at halda fram við at vísa hesum tiltaki sín vælvilja og áhuga.

Sjónvarpið visti í gjár at siga frá, at ein trupulleiki hevur tikið seg upp til komandi oyggjaleikir í Hetlandi í næsta ár. Pláss er ikki fyri at veita eitt nú føroyskum áskoðarum innivist til hesar leikir. Hetta kemur eitt sindur illa við, tí hvat eru oyggjaleikir uttan áskoðarar, og júst nú tá tosað hevur verið um at knýta enn tættari bond millum eitt nú Føroyar og Hetland og annars hinar oyggjabólkarnar í grannalagnum, so kemur tað heilt óvart á, at pláss ikki skal vera fyri at veita føroyingum, sum ætla sær at vitja Hetland, innivist.

Gott er at hetta kemur fram so tíðliga, soleiðis at hetlendskir og føroyskir myndugleikar verða førir fyri at gera nakað skilagott við henda trupulleika. Her mugu øll góð høvd leggjast í blot. Tí nettupp einir oyggjarleikir eru eitt av trumfkortunum skal nakar álvari verða í ynskinum um at menna samvinnuna millum oyggjasamfeløgini. Vit hava sæð, hvussu hetlendingar hava víst ein sera góðan vilja at seta pengar í Norrønu. Hetta er nakað, sum føroyingar eiga at fegnast um, tí har ábyrgd, skyldur og vinningur fylgjast at, har ber til at røkka longst.

Tað skal tí vera okkara vón, at góð fólk og myndugleikar í Hetlandi vísa umrødda trupulleika ans longu nú. Tí hvat er betri til at marknaðarføra Hetland sum ferðaland og samvinnuna millum oyggjabólkarnar enn júst einir væleydnaðir oyggjaleikir við luttøku ikki bert av ítróttarfólki men eisini av áskoðaraum. Og áskoðarar vilja so eisini vera ferðafólk sum knýta eitt ferðaupplivilsi saman við tí at síggja og stuðla sínum egnu við einar oyggjaleikir.

Tí er okkara ráð: farið í gongd nú við at skaffa komandi vitjandi føroyingum innivist. Kanska hetta kundi verið ein uppgáva fyri Smyril Line eisini og fólkini í hetlensku fyrisitingini, ið hava Føroyar og føroyingar í sínum hjarta. Annars vilja vit bera hetlendingum okkara bestu ynski um einar góðar oyggjaleikir næsta ár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Med hovedet under armen

**Jørn Astrup Hansen**



Under titlen *Hovedet på blokken* havde Den Nordatlantiske Gruppe i Folketinget den 25. maj 2004 arrangeret en konference om økonomien i rigsfællesskabet.

Lægges den efterfølgende omtale i de færøske medier til grund, sidder man tilbage med en oplevelse af, at konferencen alene beskæftigede sig med det danske bloktilskud til Færøerne. Det var ikke tilfældet.

Selv havde jeg et indlæg om udviklingstendenser i færøsk økonomi. Jeg beskæftigede mig navnlig med rekonstruktionen af erhvervslivet først i 90'erne og reguleringen af fiskeriet. Jeg kom i mit indlæg ind på den finansielle risiko, som adgangen til at kapitalisere fiskerettighederne kan antages at ville påføre den færøske fiskerflåde og långiverne til flåden. Ligeledes kom jeg ind på den betydelige rolle, som de offentlige fonde siden krisen har fået som ejere af store dele af færøsk erhvervsliv.

Men ikke et ord om bloktilskuddet. Det var netop ikke en del af mit emne.

Dog foretog jeg som indledning til mit indlæg et lille strejftog gennem færøsk økonomi siden 1977, da de nuværende fiskerigrænser trådte i kraft. Om højkonjunkturen i 1983-88 gjorde jeg i forbigående gældende, at Færøerne i denne periode næppe havde glæde af tilskuddet fra Danmark. Tilskuddet, som under højkonjunkturen formentlig blot gjorde ondt værre, var medvirkende til, at vi fik for meget fart på økonomien. Så meget fart, at vi i den efterfølgende periode kørte i grøften og kom slemt til skade derved.

På denne baggrund har det forbløffet mig, at jeg efterfølgende er blevet tillagt udtalelser som *Blokkstuðulin er skaðiligur.* Jeg har ikke udtalt mig på denne måde. Udtalelsen er ikke dækkende for konferencen, langt mindre for mit indlæg.

Af hele balladen de seneste par uger kunne man i øvrigt få den opfattelse, at en debat om bloktilskuddets plads i færøsk økonomi og om den måde, vi anvender bloktilskuddet på, skulle være skadelig.

Det er jeg ikke enig i.




*Forsíðan á Fregnum nr. 18, 28. mai, har Jørn Astrup Hansen verður endurgivin fyri at siga, at blokkstuðulin er skaðiligur. Hesi orðini sigur hann seg ongantíð hava sagt*

### Kapping millum hundar

Leygardagin tann 5. juni skipaði Føroya Seyðahundafelag fyri seyðahundakapping i Havnardali. Nakað av fólki var komið at hyggja eftir kappingini, sum hevur verið fyri stórari menning seinnu árini. Sagt varð, at hundarnir róku seyðin við stórum neyvleika. Í klassa 3 vann Moss við Apsalon Hansen, sum fingu 308 stigum. Í klassa 2 kappaðust sjey hundar, og ta kappingina vann Peik við Hanus Højgaard. Teir fingu 268 stig. Og í klassa 1 varð tað hundurin Tweed hjá Jónleif Sólsker, sum vann við 163 stigum. Vinnararnir fingu steyp.

**hkm**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# At gera av við orðaskiftið

»Ríðir tú út í hemin við svørinum drignum úr slíðranum, sært tú út til at vera stríðsfúsur, men ansa eftir at tú ikki skerir oyrini av hestinum«
Francoise Grose

**Kim Simonsen**



Sjúrður Skaale hevur gjørt mangt og hvat seinastu árini. Herfyri kallaði hann Jan Müller fyri klikkaðan og ein fanatikara. Jan var ikki til staðar til ein av (teim mongu) fundunum, ið Norðatlantsbólkurin helt herfyri. Sjúrður meinar tí, at Jan, ella onnur, ið ikki vóru har, sjálvt um Sosialurin hevði fólk á staðnum, hava ikki rætt at hava eina meining um framtíðar støðu Føroya og um framtíð ríkisfelagsskapsins. Sjúrður letur hørð orð fella og er alt ov persónligur. Tann, ið gerst persónligur hevur tapt, og Sjúrður og Høgni Hoydal hava mist nærum alt álitið, ið føroyingar einaferð høvdu á teimum.

Ein føroyskur blaðstjóri hevur rætt til av hava eina meining um ráðstevnur og fundir millum danir og føroyingar, og um tiltøk, ið ávirka støðuna millum londini. Blokkurin er eymasta málið í dag millum Danmark og Føroyar. Eg vildi mett, at ein blaðstjóri skal hava eina meining um eitt slíkt tiltak. Sjúrður sjálvur, ið er eitt slag av ráðgeva/spindoktari fyri Høgna Hoydal er hin vegin løntur fyri at koma við álopum á tey, ið hótta Tjóðveldisflokkin og teirra arbeiði. Sjúrður hevur fyrr m. a. roynt seg við álopum á øll, ið skriva í Dimmalætting og í Skáa fyri at taka tilfar frá øðrum. Her royndi hann at sáa eitt fræ av misáliti mótvegis Dimmu og okkum, ið javnan skriva har. Rætt er, at onkur hevur skrivað okkurt av, men hetta gevur ikki honum rættin at skuldseta okkum øll. Sjálvur brúki eg eitt hav av keldum, men eg nevni tær altíð. Onkur hevur funnist at hesum at skriva greinar í lærda endanum og at prenta keldulistar, men hetta haldi eg fast um. Bæði akademikarar og blaðfólk brúka keldur, hetta merkir ikki at tey plagiera, og um onkur hevur gjørt tað, merkir hetta ikki, at øll gera tað!

Í hesum førinum hevur Jan eisini sínar keldur, hann kemur bert ikki fram til tað, sum Sjúrður ella onnur vilja hoyra. Jan er hvørki klikkaður ella nakar fanatikari, tað eru orð, ið passa nógv betur um undanfarna landstýrið, ið skapti eina pínliga øsing og nelgdi misálitið fast millum londini í ríkisfelagsskapinum, sum útisetar enn merkja sviðan av.

Tjóðveldisflokkurin hevur altíð livað av at skapt øsingar, samansvørjingarástøði og paranoia. Longu teir fyrstu nationalistarnir løgdu á at skriva søguna eftir teirra egna høvdi, og ikki var altíð so nógv innan fyri hjá Jóannes Patursson, Ellinti Patursson og seinni í bókini hjá Høgna. Taka vit syndrið av kjøti, ið er í hesum søgubókum frá, er bert mytur, søgufalsan og fólkaøsing eftir, og tað Sjúrður borðreiður við í sínum álopum er júst hetta.

Tað er syrgiligt at síggja orðaskiftið søkka niður á eitt slíkt óvirðiligt støði. Tey sum eru sperd av avmakt rópa ókvæmisorð og er einki eftir at siga, koma orð sum »klikkaður« fram, tá er alt orðaskifti deytt.

Ikki bert Jan, men fólk í Føroyum er deyðatroytt av at hava føroyskar politikarar, hvørs fremsta uppgáva hevur verið at saga av ta grein, vit hava livað á í ættarlið. Henda greinin umboðar viðurskiftini við Danmark og ikki bert eina Ríkisveiting. Tað býttasta Poul Nyrup gjørdi, var at seta hart móti hørðum. Anders Fogh Rasmussen dugir betri, hansara stjórn veit, at sjálvstýrisgongdin ikki hevði eitt fólksligt mandat og bjóðar fegin eina loysing, tí meirilutin í Føroyum vil ikki hava hesa.

»Søgan endurtekur seg«, tók ein lærdur maður til, »fyrst sum ein glantrileikur og seinni sum ein sorgarleikur«.

At Høgni, eftir ein dygg-an ósiður við øllum hann hevur barst fyri síðani 1998, enn skal sita á Christansborg er júst ein grantrileikur. At hann hevur ráðgevar, ið bert vilja rópa eyknevni og oyðileggja allar møguleikar fyri orðaskifti í framtíðini millum andstøðuna og sitandi landsstýri er sorgarleikurin.

# Um blokkniðurskurðin

**Katrin Hovland Petersen**
*musikkskúlanæmingur*

Hetta lesarabrævið snýr seg um, at blokkurin er skorin niður.

Ná, men nú er tað so hent. Tað, sum tveir av flokkunum ávaraðu móti! Blokkstuðulin fór niður, og so mugu føroyingar skera niður á so nógv ting! Ting, sum eru neyðug!

Okay, soleiðis var støðan, tá ið blokkstuðulin var skorin niður: Vinnulívið gekk bara væl, so væl at vit høvdu yvirskot. Hvat ger so tað gamla landsstýrið, sum var tá? Jújú, teir skera blokkstuðulin niður, so at vit **akkurat** klára tað! Orsaka mín talimáta, men hvussu dummur kann man vera? Høvdu tit problemir við at hyggja eftir støðuni realistisk? So nú gongur vinnulívið ikki so væl, og hvat hendir??! Vit missa pengar, sum vit hava brúk fyri! Tað gongur út yvir skúlar, nýggja útgerð til sjúkrahús og eisini musikkskúlan! Fleiri fólk verða arbeiðsleys, og tað skal man ikki vera ein ekspertur fyri at vita, at tað ikki er gott, ha?

Høvdu vit ikki koyrt blokkstuðulin niður, so høvdu vit havt 200 milliónir yvirskoti!

Think about that!

Tað verða enn meira børn, ið ikki fáa tann deiliga møguleikan at spæla musikk. Teir flestu musikkskúlarnir eru longu illa útgjørdir við musikkinstrumentum, sum brúkast skal.

Mítt forslag er, at tey, ið vildu fara á »fattiggården« og vildu hava blokkstuðulin niður, at vit ikki lata tey koma til valdið aftur.

Nú mugu vit minnast, at tað var tað gamla landsstýri, ið gjørdu hesar feilir, og tað verður tað nýggja landsstýrið, ið kemur at handfara trupulleikarnar, so latið tykkara vreiði ikki ganga út yvir tað nýggja landsstýrið! Til tey, ið vildu hava blokkin niður: Tað eru tykkara børn, ið verða tey, ið líða, um hettar skal halda fram! Tað er for galið, at tykkara stoltheit skal ganga útyvir tykkara børn!!!

Men til tey, sum ikki vildu hava blokkstuðulin niður, haldið tit áfram við tí góða arbeiðinum, tí at tit eru tey røttu til at stýra landi okkara, og tit verða tey, ið koma at redda Føroyar frá at fara fallit seinni!

P. s. til miðflokkin:
Jú, tit stemmaðu blokkin niður. Nú hava tit gjørt ein feil, og nú skulu tit ikki vága tykkum at siga, at tit ikki gjørdu tað! Ikki snúgva tykkum undan ábyrgdini. Um tit so aftur siga, at tit ikki stemmaðu fyri at fáa hann niður, hygg so bert í tingbøkurnar!

# Miðflokkurin skerdi ikki blokkin

**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*



Familjan Petersen hevur í tveimum lesarabrøvum ført fram, at Miðflokkurin var við til at skerja blokkin. Hetta skal eg enn einaferð afturvísa og biðja tann, sum ivast, kanna søguna. Hesi eru tey ítøkiligu viðurskiftini í málinum.

**Yvirtøkulógin**
2. august í 2001 (tá var Miðflokkurin í andstøðu) legði Høgni Hoydal, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi uppskot til løgtingslóg um at taka yvir málini og málsøkini á lista A í heimastýrislógini (Yvirtøkulógin). Greitt varð í viðmerkingunum frá avleiðingunum av uppskotinum, sum m.a. vóru, at blokkurin skuldi skerjast við 366 mió. kr.

Miðflokkurin hevði sína egnu støðu til hetta uppskotið, sum framgongur soleiðis í viðmerkingunum í álitinum hjá uttanlandsnevndini: Ein fjórði minniluti (Jenis av Rana) tekur undir við uppskotinum, men hevur hesar viðmerkingar í sambandi við, at landsstýrið nýtir hesar yvirtøkur sum grundgeving fyri einvísari minkan av heildarveitingini. (Tað verður ov drúgt at endurgeva viðmerkingarnar, men boðskapurin er einfaldur: **Miðflokkurin tekur ikki undir við at minka blokkin** sum eitt úrslit av hesum uppskotinum, men tekur undir við, at vit føroyingar sjálvir skulu taka fulla ábyrgd av hesum málsøkjum.

At familjan Petersen ikki skilir, at tú kanst atkvøða fyri einum uppskoti uttan at vera samdur í øllum tí, sum uppskotið hevur við sær, er løgið. T.d. er vanligt, at allir tinglimir samtykkja eina fíggjarlóg, hóast tað kunnu vera nógv mál, sum flokkarnir ikki taka undir við í fíggjarlógini. Men ikki ber til í tingskipanini at skilja mál sundur, soleiðis at tú kanst atkvøða fyri tí, tú tekur undir við, og ímóti tí, tú ikki tekur undir við. Tí verða broytingaruppskot sett fram undir 2. viðgerð, fyri at gera vart við støðu floksins.

**Miðflokkurin egið uppskot**
Miðflokkurin var sum sagt ímóti at skerja blokkin sum ein avleiðing av yvirtøkulógini, men tók undir við yvirtøkulógini, sum snúði seg um, at vit føroyingar skuldu sjálvir hava fulla ábyrgd av ávísum málsøkjum. Fyri at undirstrika, at Miðflokkurin ikki tók undir við at skerja blokkin, gjørdi Jenis av Rana vart við sína støðu við at leggja eitt nýtt uppskot fyri tingið um fólkaatkvøðu um niðurskurð av blokkinum við teimum viðmerkingum, at ætlanin við blokkniðurskurði var høpisleys. Hetta var sostatt ein roynd at slíta sundur sambandið millum yvirtøkulógina og niðurskurðin av blokkin. Uppskotið, sum Jenis av Rana setti fram 25. september 2001, var eitt uppskot til samtyktar soljóðandi: Løgtingið heitir á landsstýrið um sum skjótast at leggja fyri Løgtingið uppskot til ríkislógartilmæli um stuðul til heimastýri Føroya í 2002 og uppskot til løgtingslóg um at halda leiðbeinandi fólkaatkvøðu um uppskotið til ríkislógartilmælið, aftaná at tað er samtykt í Løgtinginum, men áðrenn tað er staðfest og fráboðað ríkismyndugleikunum av løgmanni. Hesum uppskotinum tóku bæði sambands- og javnaðarflokkurin undir við, so heilt galið man tað ikki hava verið sæð frá sjónarhorninum hjá Petersen familjuni.

**Niðurstøða**
Soleiðis er tað enn einaferð staðfest, at Miðflokkurin tók ikki undir við at skerja blokkin, men tók undir við at yvirtaka málsøkir. Vit meta framvegis, at vit føroyingar eiga at hava fullan avgerðarrætt og fulla ábyrgd av øllum málsøkjum, men at peningurin, sum danir fáa fyri at leiga føroyskt lendi út til Nato (blokkurin) er okkara og eigur ikki at tengjast saman við, hvør ræður og stýrir í Føroyum.

### Føroyingar seinni enn onnur

Ein kanning er júst almannakunngjørd, sum vísir, at føroyingar niðurbróta ávísan heilivág seinni enn onnur hvít fólkasløg. Tað skrivar Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í tíðindaskrivi. 300 tilvildarliga valdir føroyingar í aldrinum 18-60 ár, búsitandi í Vágum, Streymoy og Eysturoy, luttóku í kanningini, sum er eitt samstarv millum Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Danmarks Farmaceutiske Universitet og deildir á Syddansk Universitet. Í tíðindaskrivinum stendur víðari at lesa, at "kanningin vísti, at virknið hjá hesum enzymum ikki er tað sama hjá øllum føroyingum. Føroyingar kunnu, eins og flest onnur fólkasløg, býtast í tveir bólkar hvat viðvíkir hesum enzymum: tey, sum niðurbróta heilivág seint og tey, sum niðurbróta vanligt. Harafturat vísti kanningin, at enzymvirknið brýtur frá tí, sum er sæð hjá øðrum kaukasusfólki (hvítum fólkasløgum), tá talan er um enzymið CYP2D6. Her vísti tað seg, at umleið 14% av føroyingum eru seinir niðurbrótarar av ávísum heilivági í mun til 7% í okkara grannalondum." Greitt verður frá, at so høgur títtleiki av seintniðurbrótandi persónum er ikki sæddur fyrr hjá hvítum fólki, og at tað er eitt áhugavert úrslit.

**hkm**